*Vegagerðin í sambandi við tunnilin undirVestmannasundi:*

# Fylgdi ikki sínum egnu ráðgevarum

*Leiðslan í P/F Vágatunlinum skúgvaði tilmælið hjá sínum egna ráðgevara til viks, tá ið hon tók samráðingar upp við J&K Petersen um at gera vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin*

Áki Bertholdsen



*Landsverkfrøðingurin skuldi lata P/F Vágatunlinum tilmæli um, hvat tilboð var tað besta. Og hjá honum var ongin ivi um, at Byggitek skuldi fáa arbeiðið at gera vegirnar til undirsjóvartunnilin, tí teir høvdu tað lægsta tilboðið. Men hóast tað, verður nú samráðst við J&K Petersen um at gera arbeiðið*

Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin fylgdi ikki tilmælinum frá sínum egna ráðgevara, tá ið hon gjørdi av at lata byggifelagið J&K Petersen fáa arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við tunnilin undir Vestmannasundi.

Hóast J&K Petersen ikki høvdu tað lægsta tilboðið uppá arbeiðið, hevur leiðslan fyri Vágatunnilin gjørt av at fara undir samráðingar við júst tað byggifelagið um at gera arbeiðið.

Sostatt er Byggitek sett til síðis, hóast tað hevði tað lægsta tilboðið.

Men fyri ráðgevarin hjá P/F Vágatunlinum var ongin ivi um, at tað var Byggitek, sum skuldi fáa arbeiðið.

Eftir lógini um Vágatunnilin skal Landsverkfrøðingurin hava tað umsjónina við vegarbeiðnum so at tað verður so væl út hondum greitt, sum tað krevst.

Men samstundis skuldi Landsverkfrøðingurin bjóða vegarbeiðið út.

Og tá ið tilboðini vóru komin inn, skuldi hann somuleiðis geva leiðsluni í P/F Vágatunlinum eitt tilmæli um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

Men tað var kortini leiðslan fyri Vágatunnilin sum tók endaligu avgerðina um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

Hetta hevur Landsverkfrøðingurin gjørt.

–Tá ið tilboðini vóru komin inn, var tað ongin ivi um, at tað var lægsta tilboð, sum skudi fáa arbeiðið, og tað mæltu vit eisini, sigur Óli Petersen á Framleiðsludeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

**Heilt Óvanligt**

Óli Petersen sigur, at tá ið eitt arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión, er tað heilt óvanligt ikki at taka av tí lægsta tilboðnum.

–Tá ið eitt arbeiði verður boðið í innbodnari lisitatión, verða bara tey feløg boðin at bjóða, sum byggiharrin frammaundan góðkennir og metir er førir fyri at gera arbeiðið til lítar.

–Tí er tað eitt prinsipp, at byggiharrin tekur av tí lægsta tilboðnum.

– Men ger hann ikki tað, eigur hann at hava ógvuliga góðar grundir til lata onkran annan fáa arbeiðið.

Óli Petersen sigur, at nú Leiðslan í P/F Vágatunlinum hevur gjørt av at samráðast við J & K Petersen um at gera arbeiðið, hava teir helst onkrar orsøkir, sum teir kunnu verja avgerðina við.

Men tær orsøkirnar kennir Landsverkfrøðingurin ikki, leggur hann afturat.

*Men kannaðu tit ikki tilboðini, sum komu inn, áðrenn tit mæltu til, hvør skuldi fáa arbeiðið?*

–Jú, tað gørdu vit, hóast vit kanska ikki fóru heilt í dýpdina, ella í smálutirnar.

– Og hjá okkum var als ongin ivi um, at byggitek skuldi fáa arbeiðið.

– Vit mettu so ikki, at nøkur orsøk var til at víkja frá meginregluni um at lata lægsta tilboð fáa arbeiðið.

– Og var talan um ymiskt í tilboðunum, sum leiðslan í P/F Vágatunlinum vildi tosa meiri um við byggifeløgini, sum høvdu latið tilboð, vildi eg hildið, at samráðingar áttu fyrst at verið við Byggitek, sum hevði lægsta tilboðið

Óli Petersen sigur, at nú leiðslan fyri Vágatunlinum hevur gjørt av ikki at taka av lægsta tilboði, tá ið talan er um innbodna lisitatión, hevur hon samstundis brotið eitt týdningarmikið prinsipp í byggivinnuni.

– Nú er vandi fyri, at vit fara á glið og so er ikki gott at vita, hvar vit enda, sigur hann.

Hann sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur mangan boðið arbeiðir út í innbodnari lisitatión og tá verða „spælireglarnar“ hildnar um, at lægsta tilboð fær arbeiðið, tí tey feløg, sum verða boðin at bjóða, eru frammanundan góðtikin.

*Hvussu verður so at hava umsjónina við einum arbeiðið, hóast tykkara tilmælið verður skúgvað til viks?*

– Eg ivist í, um tað fær nakra ávirkan fyri okkum sum so, tí í síðsta enda er tað P/F Vágatunnilin sum skal gjalda arbeiðið.

– Tað, einasta, vit skulu gera, er at hava umsjónina við, at arbeiðið tekniskt verður væl úr hondum greitt og lýkur krøvini, sigur Óli Petersen.

Hann ivast ikki í, at J&K Petersen er fult førir fyri at útinna arbeiðið á fullgóðan hátt, men tað er ikki tað, sum hetta málið snýr seg um.

– Hetta snýr seg um at víkja frá einum prinsippi, sum byggivinnan hevur hildið nokk so fast um, og tað kann verða óheppið, sigur Óli Petersen.

# Hevur sent ein skelk ígjøgnum alla byggivinnuna

*–Tað kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri føroyska byggivinnu, at leiðslan í P/F Vágatunlinum ikki tekur tað bíligasta tilboðið, siga byggikøn*

Áki Bertholdsen

Avgerðin, at taka samráðingar upp við J&K Petersen um at gera vegirnar í sambandi við Vágatunnilin, hóast Byggitek hevði lægsta tilboðið, hevur sent ein skelk ígjøgnum alla ta føroysku byggivinnuna.

– Tað eigur ikki at koma fyri, at tað lægsta tilboðið verður vrakað, tá ið eitt arbeiðið verður boðið úr í innbodnari lisitatión.

– Og tað kemur heldur aldrin fyri.

Tað siga byggikøn við Sosialin.

Sostatt vísa tey aftur, tí, sum stjórin fyri P/F Vágatunlinum segði í Sosialinum í gjár, at tað var ikki óvanligt, at vraka tað lægsta tilboðið, hóast talan var um innbodna lisitatión.

–At tað lægsta tilboðið skal fáa arbeiðið í eini innbodnari lisitatión er eitt prinsipp, sum byggivinnan hevur stríst hart fyri, siga byggikøn við Sosialinum.

Fá munnu hava boðið so nógv arbeiðið út sum Landsverkfrøðingurin og hóast tann stovnurin nú er



*Nú er eitt týdningarmkkið prinsipp brotið og nú er ringt at vita, hvar byggivinnan steðgar aftur*

hálvthundrað ára gamal er tað neyvan komið fyri, at tað ikki er tikið av tí lægsta tilboðnum.

Tær heilt fáu ferðina, undantøk eru gjørd, hevur tað t.d. verið, tá ið eitt byggifelag er komið eftir, at tað hevur roknað skeivt og hevur tí latið eitt ov lágt tilboð inn.

Tá er hendan ásetingin onkuntíð brúkt fyri at sleppa byggifelagnum úr eini knípu.

Annars sigur lisitatiónslogin, at í innbodnari lisitatión skal byggiharrin taka av tí lægsta tilboðnum.

At byggiharrin tilskilar sær rætt til at velja og vrakað ímillum tey innkomnu tilboðini, er ein áseting, sum altíð stendur.

Men hann verður ongantíð brúktur, uttan í onkrum heilt merkiligum førum, sum t.d. í døminum omanfyri.

Byggikøn siga tí, at nú leiðslan fyri Vágatunnilin er farið at samráðast við J&K Petersen, hóast Byggitek hevði lægsta tilboðið, hevur hn brotið eitt prinsipp, sum kann verða ótrúliga ringt at byggja upp aftur.

Ikki minst er hetta prinsippbrot álvarsligt í hesum førum, tí her er talan um almennan pening.

– Hetta er langt úti. Nú er ein av hornasteinunum í byggivinnuni brotin. Nú eru vit komin á glið og tað er ringt at vita, hvar vit enda.

– Men hetta er vónandi ikki eitt tekin um, at vit skulu hava ein ávísan politiskan lit fyri at fáa byggiarbeiðið í Føroyum.....



# Barnagarður á havsins botni



*Nøkur av børnunum framman fyri ein part av úrslitinum*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

*Ein av stovunum í Barnagarðinum við Velbastaðvegin er í hesum døgum eins og havsins botnur á at líta*

Jákup Mørk

Seinastu seks vikurnar hava nøkur børn í Barnagarðinum við Velbastaðvegin stríðst við at umskapa stovu teirra, Innistovu, til havumhvørvi.

Talan er um eina verkætlan, sum starvsfólkini í stovuni settu sær fyri at gera saman við børnunum.

**Lætt at velja**

Fyrst og fremst varð sjálvandi tosað um, júst hvat verkætlanin skuldi innibera, og sum skilst, var ikki so ringt at finna sær evni.

Jeanette Joensen, sum er ein av pedagogunum á stovninum, sigur við Sosialin, at tey valdi havið, tí hetta er í okkara nærumhvørvi. Harumframt er hetta eisini eitt evni, sum veruliga fær nakað at røra seg í børnum.

Í samfullar seks vikur hava børn og starvsfólk so fingist við at rigga stovuna til. Børnini hava verið í Sandágerði, har tari, skeljar og annað hevur verið heintað, og sjálvsagt hava tey eisini øll verið á floti.

At alt hetta so eisini fall saman við góðveðrinum, sum hevur verið at kalla allan mei mánaða, hevur sjálvandi heldur ikki gjørt tað verri, og yvirhøvur tykjast starvsfólkini sera væl

**Mennandi**

Jeanette Joensen sigur, at eftir hennara fatan hevur verkætlanin verið sera mennandi fyri bæði børn og starvsfólk, og hon vónar, at talan verður um eitt afturvendandi tiltak.

Týskvøldið, tá umskapanin av stovuni var liðug, høvdu børnini so framsýning fyri hinum stovunum, foreldrum og øðrum, og eisini er ætlanin at bjóða øðrum barnagørðum inn at síggja sjónliga úrslitið av verkætlanini.



*Tari og skeljar hoyra sjálvandi eisini havumhvørvinum til*
**Mynd: Álvur Haraldsen**



*Helgi Joensen við tveimum av standmyndum sínum* **Mynd: Jens Kristian Vang**

# Anker Eli og Helgi í Smiðjuni

*Anker Eli Petersen og Helgi Joensen fara komandi vikuna at sýna fram í Smiðjuni í Lítluvík í Havn*

Listamenninir Anker Eli Petersen og Helgi Joensen hava framsýning í Smiðjuni í Lítluvík komandi vikuna.

Anker Eli Petersen sýnir fram tekningar og prýðislutir, meðan Helgi Joensen sýnir standmyndir og vasar.

Myndirnar hjá Ankeri Eli Petersen eru slíkar, hann millum annað hevur gjørt til frímerki hjá Postverkinum.

Umframt verða vístir prýðislutir, hann hevur teknað, og sum 3´arin í SMS hevur evnað til úr silvuri.

Anker Eli hevur fyrr verið á fleiri framsýningum, umframt at hann er kendur úr tónleikaheiminum.

Helgi Joensen, sum býr í Noreg, fer at vísa lutir úr tini. Talan er um standmyndir og vasar, umframt at eitt relief eisini verður við.

Helgi Joensen hevur eisini fleiri ferðir verið á framsýningum í Føroyum. Og hann hevur eisini ferðast víða til framsýningar. Hann hevur verið í nógvum europeiskum stórbýum, umframt eisini á fleiri framsýningum í Amerika.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík letur upp í morgin, sunnudagin, klokkan 14 og verður opin til klokkan 20.

Alla komandi viku verður opið frá klokkan 11 fyrrapart til klokkan 20 á kvøldi.

Framsýningin endar hvítusunnudag, tann 11. juni, tá opið verður frá klokkan 14 til klokkan 20.

**ej**

